# Løgdu oljubyrgingar á Kaldbaksfirði

**Hósdagin vandi norska standby-báturin Strill á Kaldbaksfirði**

TRYGD
*Eyðun Klakstein*

Fyrrapartin hósdagin vóru oljubyrgingar lagdar á Kaldsbaksfirði.

Orsøkin til hetta var ikki nakar veruligur leki, men ein venjing hjá standby-bátinum Strill Safety, sum nú skal á føroyska feltið at halda vakt fyri Amerada Hess.

Pauli Einarson stóð fyri skeiðnum á Kaldbaksfirði, og hann letur væl at.

– Manningin umborð vandi at leggja oljubyrgingar út og at taka tær inn aftur, og tað gekk væl. Vit tosaðu eisini um, hvussu oljudálking kann fyribyrgjast og hvussu byrgingarnar skulu virka, sigur hann.

Pauli Einarson hevur gjørt líknandi venjing umborð á øðrum vaktarskipi, og fyrr í vikuni var eisini venjing við teirri trygdarútgerðini, sum skal liggja á landi í Suðuroy.



Hósdagin hevði vaktarskipið Strill Safety venjing á KaldbaksfirðiHósdagin hevði vaktarskipið Strill Safety venjing á Kaldbaksfirði




Laaaannngt vikuskifti í Aberdeen

hósdag til mánadag...ja!




Aberdeen hevur nógv at bjóða tær. Bæði til gaman og álvara. Unna tær eina fríløtu frá gerandisdegnum við einum longum vikuskifti í Aberdeen, har tú tekur tær av løttum. Spáka tær ein túr eftir longu handilsgøtuni Union Street. Vitja tey ymisku søvnini og tað nú so væl umtókta SATROSPHERE, sum er áhugavert fyri bæði børn og vaksin. Stuttleika tær í stuttleikaparkini Cadona´s ella slappa av í the Leisure Centre. Hugna tær við einum góðum bita á einari av teimum mongu fráliku matstovunum. Og gloym ikki at vitja pubbirnar við tí livandi tónleikinum. Ja, Aberdeen hevur sanniliga nógv at bjóða.

Fráferð úr Vágum hósdag kl. 17.30.
Fráferð úr Aberdeen mánadag kl. 09.00
ella kl 19.00.

Ferðaavgjald sum er kr. 474,- kemur afturat prísinum

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo

Bílegg hjá tínari ferðaskrivstovu ella hjá Atlantic Airways

www.atlantic.fo


## Hægri barnafrádrátt



**Klaksvík:** Í uppskotinum um fíggjarætlan fyri komandi ár ætlar Klaksvíkar kommuna at hækka barnafrádráttin.

Barnfrádrátturin, sum í ár er 3000 krónur, skal hækka upp í 3500 krónur. Hendan hækkin fer at kosta Klaksvíkar kommunu eina lítla millión.

Skattaprosentið í Klaksvík skal verða tað sama, sum tað hevur verið, 20%.

## Tøkk

Øllum tykkum, sum við gávum, telegrammum, uppringingum og tykkum, ið vóru við til 75 ára føðingardagin 12. september, sum varð hildin 15. september í hølum Gøtu Menningarfelags, takki eg hjartaliga.

**Ludvík Strømsten,
Norðragøta**



# Helvtin av ferðafólkunum kemur til Ilulissat

**Ferðafólk, sum kom til Grønlands, vilja síggja ís. Tað síggja tey í Ilulissat í Diskovíkini, og higar kemur eisini á leið helvtin av teimum umleið 20.000 ferðafólkunum, sum árliga vitja Grønland**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*



**Ilulissat:**
At umleið helvtin av øllum ferðafókum, sum vitja Grønland, koma til Ilulissat, hevur ymsar orsøkir. Millum annað at náttúran er heilt serlig, og býurin er væl útgjørdur við gistingarhúsum.

Iulissat liggur einar stórthundrað fjórðingar norðan fyri Pólkringin við munnan á Ísfjørðinum. Og júst Ísfjørðurin er eitt tað besta aktivið hjá ferðavinnuni her norðuri, greiðir Eyð Petersen frá. Hon er ættað úr Havn og starvast í ferðavinnuni her uppi.

Tey stóru ísfjøllini eru rættiliga bergtakandi, og draga væl av fólki hendanveg. Umframt er býurin væl útgjørdur við gistingarhúsum, og nógv tiltøk eru hjá ferðamanninum at fara til.

Í Ilulissat, her tað búgva umleið 4.000 fólk, eru ikki færri enn trý hotell. Umframt leiga fólk rúm út til Bed & Breckfast gistingar, so møguleikarnir at búgva eru góðir.

### Fjølbroytt tilboð

Hartil kemur, at ferðavinnutilboðini eru rættiliga nógv og fjølbroytt, greiðir Eyð Petersen frá.

Ilulissat er rættiliga frammarlaga í grønlendsku ferðavinnuni. Tað kemst eisini fyri ein stóran part av, at tey byrjaðu tíðliga at marknaðarføra býin sum ferðavinnumál. Fólk sóu møguleikarnar í ísfjøllunum. Eisini var ein tann fyrsti flogvøllurin í landinum lagdur júst her, og tað bøtti munandi um møguleikarnar at fáa fólk hendanveg, greiðir Eyð Petersen frá.

Tilboðini, sum verða boðin út her í Ilulissat, eru nógv, sigur hon. Tað eru til dømis gongutúrar, sum vara frá einum tveimum tímum og heilt upp í fleiri dagar. Her er langt at fara um, og nógv er at síggja og kanna.

So eru tað siglitúrarnir út til ísfjøllini, sum koma so veldug rekandi út úr Ísfjørðinum, har stóri jøkulin kálvar hesar fleiri 100.000 ára gomlu risarnar, sum í heilum skifta skap og lit, meðan teir spakuliga flyta seg út í opnan sjógv. Eini fýra ymiskir siglitúrar verða bodnir út her, sigur hon.



*Eyð Petersen*

Esini brúka fólk tyrlur at flyta seg inn í landið, og ganga so aftur, ella verða bara verðandi har inni, til tyrlan kemur aftur eftir teimum. Alt eftir hvussu tilboðið er lagað, sum tey keypa.

Og hundarnir eru ikki at gloyma. Tað eru fleiri hundar í Ilulissat, enn tað eru fólk. Eisini teir eru partur av ferðavinnuni, og kanksa einir 2.000 teirra eru í starvi hjá vinnuni. Soleiðis at skilja, at teir verða brúktir til sletutúrar við ferðafólki um veturin.

### Passar tølini

Eyð Petersen, sum er ættað úr Havn, hevur í nøkur ár búð og arbeitt í Ilulissat. Hon situr dagliga við roknskapinum hjá eini av ferðavinnustovunum í býnum, greiðir hon frá.

Hendan dagin, Sosialurin hitti hana, sat hon við kunningardiskin á ferðavinnumessuni Vestnorden Travel Mart, sum hoidin verður í mentanarhøllini í Ilulissat um dagarnar.

Hon greiðir frá, at eftir lokna útbúgving hjá eini grannskoðarafyritøku í Danmark arbeiddi hon eitt ár á einum gistingarhúsi í Kristianimut nakað sunnan fyri Ilulissat, áðrenn hon fór aftur til Danmarkar.

Men Grønland varð hangandi í huganum og dró so mikið, at hon fór uppaftur, og fekk tá arbeiði á einum hotelli í Ilulissat, her hon síðan hevur búð í hálvtsætta ár. Í løtuni arbeiðir hon hjá eini ferðavinnufyritøku her í býnum.

Tað eru tríggjar ferðavinnustovur í Ilulissat, greiðir Eyð Petersen frá. Tey kappast sínamillum um ferðafólkini, og tað ger so eisini, at nógv fólk koma hendanveg, tí tilboðini verða so fjølbroytt.

Hon nevnir sum dømi, at ferðafólk, sum eru eina viku í Ilulissat, kunnu velja eitt nýtt tiltak at fara til hvønn dag, tey eru í býnum.

Nógv tann størsti parturin av ferðafólkunjum, sum koma til Grønlands, eru danir. Men tað koma sanniliga eisini onnur hendanveg, greiðir Eyð Petersen frá. Hon ramsar upp týskara, fransar italienarar, amerikanarar, bretar og hvat tað nú kann vera.

Ferðavinnan er rættiliga miðsavnað um summarið, greiðir Eyð Petersen, frá. Tá koma flestu fólkini. Men so eru tað tey, sum av góðum grundum bara kunnu brúka veturin. Tey, sum aka á hundasletum. Tey plaga vanliga at koma í mars mánaða, tá líkindini eru best til slíkar aktivitetir, sigur hon.

– Jú, tað er dýrt at ferðast í Grønlandi, sigur Eyð Petersen. Nógv dýrari er at koma hendanveg, enn at fara aðrastaðni at ferðast. Men tey fólkini, sum koma til Grønlands, vita, at tað er dýrt, og tey eru eisini gjørd út til at gjalda fyri tað.

Men upplivilsið er so mikið stórt, at hetta vilja tey fegin brúka pengar uppá, greiðir Eyð Petersen frá.




TELEFONBÓKIN 2002

Í mars 2002 verur telefonbókin fyri ár 2002 borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum.

Virki, handlar og stovnar skulu boa frá av nggjum, um lst verur í Gul u síum. Boast skal eisini frá, um verandi lsing ynskist óbroytt.

**Hvítu síur**

Tsdagin 30. oktober 2001 er seinasta freist, at koma vi rættingum til Hvítu síur í telefonbókini fyri ár 2002 (vanliga telefonyvirliti). Rættingarbla til Hvítu síur er á síu 582 í telefonbókini 2001,i skal sendast til: Teknisk avgreisla, Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 31 79 68.

**Eykaupptøkur v.m.:**
Umframt rættingar til navn, bústa, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera naka serligt burturúr júst tínum telefonnummari, vi undirstrikingum, eykaupptøkum og undirupptøkum. Prísurin er 43,25 kr. (uttan mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

**Búmerki:**
Eisini ber til at umbija búmerki í Hvítu síum. Prísurin fyri búmerki er 1.500,00 kr. (ikki írokna mvg) fyri hvørja upptøku.

**Gulu síur**

Tsdagin 30. oktober 2001 er seinasta freist, at boa frá **av nggjum** , um upptøka ynskist í Gulu síum.

**Prísir:**

| | |
|---|---|
| (A)+(D) Standardlsing ............................ | kr. 650,00 |
| (B) Stórt navn ........................................ | kr. 50,00 |
| (C) Innramming ...................................... | kr. 100,00 |
| (E) Grafisk lsing pr. mm (min. 30 mm) .. | kr. 20,00 |

(sí dømi á s. 580 í Telefonbókini 2001)

**Litlsingar:**
Umframt vanligar svart/gular lsingar, er eisini møguleiki at lsa vi hvítari bakgrund og vi litum. Eykakostnaur fyri hvíta bakgrund er kr. 500,00 og fyri litir vi hvítari bakgrund kr. 1.250,00.
Skrásetingar-/Rættingarbla til Gulu síur er á síu 581 í telefonbókini 2001, i skal sendast til: Teleforlagi, Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 31 79 68.

**GG: Prísirnir á Gulu síum eru uttan mvg!**

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum*
**Postboks 27 ·110 Tórshavn ·tel 30 30 30 ·fax 30 30 31**
**www.nummar.fo · info@nummar.fo**
**www.gulu.fo · info@gulu.fo**